# Talgildisbúgving

## Læraradagur í Norðurlandahúsinum 7.-9. novembur 2023

Skrá:

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 8:00 | Morgunmatur | |
| Kl. 9:00 | Vælkoma | |
| Kl. 9:30 | **Felagsfyrilestur 1**<br>**Skíggjar í skúlanum**<br>Dorte Ågård (DK), ph.d.,<br>sjálvstøðugur námsfrøðiligur ráðgevi, hevur m.a. skrivað bókina *Skærme i skolen* | Tá farteldunar og snildfonirnar komu inn í flokshølini fyri umleið 15 árum síðan, fingu vit ikki bara nýggjar fakligar og námsfrøðiligar møguleikar, men eisini tvístøður og avbjóðingar, m.a. orsakað av talgilda órógvinum, sum fylgdi við. Kring allan heimin verður í dag roynt at steðga á og skilja ímillum tær góðu og tær minni góðu síðurnar av teldunýtslu. Men hetta er trupult, m.a. tí hugburðurin til talgilding og skíggjanýtslu í skúlunum er so ymiskur.<br>Fyrilesturin gevur eina greining av broytingunum, sum eru hendar í flokshølinum og við floksleiðsluni, og mest eyðkendu áskoðanirnar í kjakinum um talgilding verða umrøddar. Komið verður eisini inn á, hvat havast skal í huga, tá ein skúli skal velja eina skíggjaætlan. Fyrilesturin tekur støði í bókini *Skærme i skolen* frá 2021. |
| Kl.10:25 | Kaffisteðgur | |
| Kl.10:55 | **Felagsfyrilestur 2**<br>**Tilgjørt vit í undirvísingini – skulu vit gleða okkum ella vera stúrin?**<br>Martin Zachariasen, ph.d. í teldufrøði, rektari á Fróðskaparsetrinum | Talgilda tøknin, og serliga tilgjørt vit (AI), fer at broyta kognitiva arbeiðslagið hjá menniskjum í framtíðini. Teldur taka sær longu nú av nógvum kognitivum uppgávum og fara í framtíðini at kunna hjálpa menniskjum við enn fleiri uppgávum. Henda broyting hevur stóran týdning fyri førleikamenning og undirvísing av børnum og ungum. Skulu vit gleða okkum ella vera stúrin? |
| Kl. 11:40 | Døgurðasteðgur | |

| Kl.12:40 | Verkstova 1 | Verkstova 2 | Verkstova 3 | Verkstova 4 | Verkstova 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Verkstova 1:**<br>**Ítøkiligur íblástur til nýggjan talgildan skúlapolitikk**<br>Dorte Ågård (DK) | **Verkstova 2:**<br>**Kt í gerandisdegnum í skúlanum**<br>Sjúrður Ravnsfjall, lærari og kt-vørður | **Verkstova 3:**<br>**Talgildisbúgving í undirvísingini**<br>Tóri Slættalíð, deildarleiðari í Námi | **Verkstova 4:**<br>**Skúlanet og kt-trygd**<br>Andreas Simonsen og Djóni á Boðanesi, Skúlanet | **Verkstova 5:**<br>**Tøknilig fatan**<br>Hans Fróði Jensen, Bjørg Akraberg Poulsen og Trúgvi Hansen, lærarar |
| | Verkstovan byggir víðari á fyrilesturin og ítøkiligger, hvussu til ber at fremja ein felags talgildan skúla-politikk. Samstundis, sum vit varðveita telduna sum eitt skilagott fakligt arbeiðs-amboð, kunnu vit við at avmarka skíggjanýtsluna minka um órógvið og styrkja floksfelagsskapin. Íblásturin stavar frá eini floksleiðslu-verkætlan í studentaskúla-num í Nyborg, har skíggja-nýtsla var í miðdeplinum. | Verkstovan er tvídeild, og komið verður bæði inn á meira og minni skilagóða kt-nýtslu.<br><br>Við stakdømum verður greitt frá, hvussu kt kann nýtast á skilagóðan hátt í skúlanum. Miðað verður ímóti, at luttakarar á verkstovuni kenna støður aftur úr egnari undirvísing og møguliga fáa góð hugskot við á vegnum.<br><br>Við øðrum stakdømum verður síðan víst, hvussu kt kann verða nýtt uttan skil í undirvísingini. Endamálið her er at vísa, at tað ikki altíð er skilagott at nýta kt í undirvísingini. | Hugtakið talgildisbúgving verður meira og meira nýtt í undirvísingarhøpi. Talgildisbúgving snýr seg í høvuðsheitum um at flyta albúgving inn í talgilda heimin. Men hvat merkir tað í undirvísingarhøpi?<br>Og hvussu verður talgildis-búgving sameindur táttur í undirvísingini?<br><br>Endamálið við verkstovuni er at gera hugtakið talgildis-búgving meira ítøkiligt, bæði við at lýsa tað og við ítøkiligum dømum, sum kunnu nýtast í undir-vísingini. | Ein týðandi fyrimunur við felags skúlaneti er, at almenna kt-trygdin verður betrað fyri allar skúlar. Skúlanet tryggjar somu kós og ætlan fyri undirstøðu-kervið í øllum undirvísingar-geiranum.<br><br>Í verkstovuni verður greitt frá, hvussu kt-trygdin úti á skúlunum og í Skúlaneti eru skipað. Eisini verður komið inn á, hvussu einstaki skúlin eigur at handfara kreppur, eitt nú tá hakkarar hava ræði á hardware, software og/ella dátum. | Verkstovan tekur støði í 3-ára menningarátakinum ”Tøknilig fatan”, sum 4. - 6. flokkur í Skúlanum á Argjahamri hevur luttikið í. Endamálið við átakinum er at hækka grundstøðið hjá næmingunum, so at tey eru betur før fyri at klára seg í talgilda heiminum.<br>Greitt verður frá, hvussu arbeitt hevur verið, hvørji øki hava verið viðgjørd, og hvørjar royndir lærarar og næmingar hava gjørt sær.<br>Verkstovan fevnir bæði um framløgu og verkligan part, har til ber at royna ymiskt, sum næmingarnir hava arbeitt við. |

| | |
|---|---|
| Kl.13:25 | Kaffisteðgur |
| Kl.13:55 | **Verkstovur, 2. umfar** |
| Kl.14:40 | **Ráðstevnan er liðug** |